# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

**Dagurin**
**21. desember. Tummasarmessa**. Lærusveinurin sum fekk navnið *hin vantrúni*. Halgisøgan sigur, at hann boðaði evangeliið í Indiu, og har er í hvussu so er eitt tummasarkirkjulið, sum hann sigst at hava stovnað. Har eysturi sigst hann annars at hava hitt vísmenninar úr Eysturlondum. Hann var tikin av døgum, gjøgnumstungin við spjóti, og á kirkjubøstóluunum sæst hann við spjóti í hendi.
Tummas merkir *tvíburi*, og hann verður eisini nevndur við grikska navninum Didymos.

## Tøkk

Fyri hjartaliga samkenslu og tað ómetaliga hjálpsemi vit fingu, tá ið góði maður, pápi, verpápi og abbi okkar

**Andrew J. Joensen**

doyði og bleiv jarðaður, takka vit øllum hjartaliga.

**Halltóra,**
**Eyðun, Marin, Ása, Ingun, Annika og Sofus**



## Tøkk

Vit takka hjartaliga øllum, sum gleddu okkum á okkara gullbrúdleypsdegi 11. desember 2004.

Eisini ynskja vit øllum eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.

**Heilsan**
**Sigga og Vagnur Dam**
**Tórshavn**

## Nøvn í vikuni

**Kennir tú onkran ...**

Kennir tú onkran í familjuni, á arbeiðsplássinum, í grannalagnum ella hvar tað skal vera, ið hevur ein merkisdag sum t.d. rundan føðingardag, brúdleypsdag, starvsdag ella onkran, sum hevur fingið nýtt starv ella annað, so sig okkum frá.



Tú skal bara skriva navn og bústað og um gjørligt aðrar upplýsingar eisini um tann persónin tú heldur eigur at koma í blaðteigin "Nøvn í vikuni", so taka vit okkum av restini. Tú er eisini vælkomin at senda okkum nøkur orð og um møguligt mynd. Annars hava vit góðar journalistar og fotografar til slíkar uppgávur.

Navn:......................................................................................................................

Bústaður:.................................................................................................................

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum sum gleddu meg á mínum runda føðingardegi, sum var tann 24. november 2004.Takk fyri gávur, blómur, kort, fjarrit og telefonuppringingar. Og tøkk fái tit øll, sum komu í føðingardag. Og tit øll, ið stákaðust og hjálptu til við øllum.

Hjartans tøkk øll somul.

Gleðilig jól og Harrans signing í komandi ári.

**Frida Hansen**

# Próvtøkur á Tekniska Skúla í K



*Maskinsmiðir, f.v.: Berint Andreassen, P/F Skipasmiðjan á Skála, Heðin Jacobsen, P/F Pomek, Pætur Klein Jacobsen, P/F Klaksvíkar Sleipistøð, Magnus Bjarti Thorleifsson, P/F Skipasmiðjan á Skála, Arnhold Berg, P/F Skipasmiðjan á Skála, Áki Petersen, P/F Skipasmiðjan á Skála, Sverri Danielsen, Skarðhamar, Eyðun Rygshamar, P/F KJ-Hydraulik, og Johan Berg Jacobsen, P/F Klaksvíkar Sleipistøð*

## Tøkk

Hjartans tøkk til øll tykkum, ið vóru við til at gera mín 80 ára føðingardag 18. september so hugnaligan.

Tøkk fyri blómur, gávur, tlf. uppringingar og fjarrit. Ein serlig tøkk til døtrar við familju.

Eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.

**Anna Margretha Højgaard**
**Húsar**